# Gerst mediator

## Intensivt skeið í mediatión, konfliktmekling

Mediatión er skipaður dialogur, sum gevur ósamdum pørtum møguleika til undir leiðslu av meklara/mediator at tosa seg til sættis.

Tá ósemjur eru og nógvar kenslur, skaðar óheppið tosingarlag, misálit og mistulkingar samskiftið, trætan fastlæsist, og ilt er at koma burturúr aftur uttan hjálp uttanífrá.

Mediator er tann útbúni uttanveltaði triðjipersónur, sum skipar samtaluna so, at fólk lættari gerast før at loysa egnar ósemjur og at líta frameftir.

Mediator eigur ikki lut í konfliktini, høvdið er kalt og høvið at stýra samskiftinum er tí serstakt. Mediatión er ein samráðingarháttur, sum hevur sum fortreyt, at partarnir vilja tosa saman.

Útbúgvingin til mediator styrkir samstundis tín egna førleika at samráðast.

**Vika 19**

**11. mai 2011: kl. 13.00 – 16.00**
Teorisk kunning um konfliktfatan, konfliktmynstur og konflikthandfaringarhættir. Lesast skal tilfar til henda teoretiska partin.

**13. mai 2011: kl. 13.00 – 16.00**
Atburður, tosingarlag, dialogur og hegni at handfara konfliktstøður.

Hvat er konfliktmekling. Hvat eyðkennir hesa og hvussu kann hon nýtast.

**Vika 21**

**25. mai 2011: kl. 13.00 – 16.00**
Video, rolluspæl og teori

**27. mai 2011:**
**kl. 9.00 – 12.00 og 13.00 –16.00**
Fortreytirnar fyri dialogi og krøvini til meklaran. Etiskar reglur.

**Vika 22**

**30. mai 2011:**
**kl. 8.30 – 12.00 og 13.00 – 16.00**
Rolluspøl og teori, refleksión og etiskar reglur

**31. mai 2011:**
**kl. 8.30 – 12.00 og 13.00 – 16.00**
Rolluspøl og teori, refleksión og etiskar reglur

**1. juni 2011:**
**kl. 8.30 – 12.00 og kl. 13.00 – 16.00**
Rolluspøl, mediatión innan ymisk øki, teori og video

**Avmarkað luttøka:**
Til tess at luttakararnir skulu fáa høvi veruliga at royna seg sum meklarar, er luttøkan avmarkað til 10 persónar.

**Kostnaðurin:**
Pr. persón kr. 10.800 + mvg – ella **kr. 13.500,- við mvg.** Matur á middegi er íroknaður teir 3 dagarnar, rolluspølini eru. Aftrat kemur kostnaður fyri keyp av 2 bókum, uml. kr. 500,-. Annað tilfar er íroknað skeiðsgjaldinum. Skeiðsprógv verður latið.

Skeiðið og kostnaður eru treytað av nóg stórari luttøku.

**Tilmelding:** hjá Turið Debes Hentze, tdh@hentze.fo

**Málbólkur:**
Einhvør, sum hevur tørv á betri kunnleika at handfara konfliktstøður, og sum hevur ábyrgdina av at handfara tvístøður millum fólk á skilagóðan hátt.

Umframt at fáa førleikan at virka beinleiðis sum mediator, triðjipersónur í eini konflikt, fæst grundleggjandi innlit í, hvussu ein við egnum atburði og málburði ávirkar eina tvístøðu. Undirvísingin mennir eisini eins egnu evnir at samráðast konstruktiv.

**Dømi um málbólkar:**
- Fólk í leiðslustørvum
- Fjølmiðlafólk – hvør er leikluturin
- Lærarar, foreldur og børn í innan og uttanhýsis samskiftum
- Løgreglufólk (samskifti við gerningspersón og offtur)
- Advokatar og dómarar í rættarmálsviðurskiftum
- Hjúnafelagar, skifti og børn
- Arvingar í arvaskiftum
- Fakfelagsumboð, álitisfólk
- Barnavernd (samskifti við foreldur, børn, avvarðandi, fosturforeldur)
- Politikkarar í land og kommunu í samskifti við borgaran

**Teoretiska undirvísingin fevnir um:**
- Konfliktfatan. Ymiskar konfliktloysnir. Egnan leiklut í konflikt. Konfliktmynstur.
- Konfliktupptrapping og -avspenning.
- Evnini at lurta og tosingarlag.
- Dialog og samráðing. Hvørjar fellur eru - hvat er ikki dialogur
- Hvussu kann leiðarin nýta mediatión og mediatiónsamboðini.
- Hví mediatión virkar og hvørjar eru treytirnar.
- Hvørji sereyðkennini eru við mediatión.
- Nágreinilig gjøgnumgongd av mediatiónsstigunum.
- Leikluturin hjá pørtum og meklara.
- Førleikakrøv til meklaran.
- Etiskar reglur.

Undirvísari:
**Turið Debes Hentze, advokat og mediator, m.m.c.r.**

Advokatskrivstovan Hentze
**Tróndargøta 19**
**100 Tórshavn**
**tel. 311460 – fax 311490**
**hentze@hentze.fo – www.hentze.fo**



# Aðalfundur

í Kvinnufelagnum í Havn

9. mai 2011 kl. 20.00 verður aðalfundur hjá Kvinnufelagnum í Havn. Aðalfundurin verður hildin í Mettustovu úti á Reyni.

Aðalfundurin fylgir viðtøkum felagsins.

Nýggir limir kunnu tekna seg.

Uppskot, ið skulu viðgerast á aðalfundi, mugu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 8 dagar innan aðalfundin.

Um aðalfundurin ikki er viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur ½ tíma aftaná.

**Møtið fjølmentar!**

**Kvinnufelagið í Havn**

mbf Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum

# MBF Aðalfundurin 2011

Sum fyrr fráboðað verður aðalfundurin hjá MBF hósdagin 28. apríl kl. 19.00.

Skrá smb. viðtøkum felagsins.

Í samband við aðalfundin fer Barbara á Tjaldrafløtti, blaðstjóri á Kvinnu, at hava fyrilesturin »Um at ráða sær sjálvum«.

Allir limir í limafeløgunum hjá MBF kunnu møta á aðalfundinum.

**Starvsnevndin**

Zarepta



# Lega fyri støk á Zarepta

Legan er fyri øll støk, 30 ár og eldri.
Legan byrjar fríggjakvøldið 13. mai kl. 19. og heldur fram til eftir døgurða sunnudagin 15. mai.

Evnið verður
Vel lívið!

Tilmelding fer fram við at ringja til Eydnu Berg, tlf. 219651 ella 319651

Les meira á www.zarepta.fo




Altíð tað nýggjasta

www. sosialurin.fo